Tórshavnar alfrøði:

# Konfirmantarnir í apríl 1929



Konfirmantarnir í Havn 7. apríl 1929. Aftasta rað f.v.: Hendrik Jacobsen (Havn), Sjúrður Rasmussen (Havn), ókend, ókend, ókend, Niclas Andreassen (Havn), Johannes Nielsen (Nólsoy) og Jacob Henrik Højgaard (Havn).

Miðraðið f.v.: ókend, ókend, Ebba Pouline Oluffa Restorff (Havn), Jenny Wenningsted Mortensen (Havn), Alice Joensen (Hvítanes) og ókendur.

Fremsta rað f.v.: Djóni Ziska (Havn), Peter Johannes Mortensen (Argir), ókendur, og Samuel Ingvard Samuelsen (Havn).

Tann 7. apríl 1929 blivu 12 dreingir og 10 gentur konfirmeraði í Havnar kirkju, á myndini eru 10 dreingir og 8 gentur, t.v.s. at 4 konfirmantar eru ikki við á myndini. Teir konfirmantarnir sum ikki eru navngivnir á myndini eru: Valbjørn Dalsgaard (Velbastað), Joen Hans Simonsen (Norðradalur), Arne Mattheus Mikkelsen (Velbastaður), Magnus Vang (Kaldbak), Ásla Frýdahl (Velbastaður), Herborg Wenningstedt Jacobsen (Havn), Borghild Poulsen (Velbastaður), Marie Juul Thomsen (Nólsoy), Signild Tórgerda Viðstein (Havn), Hanna Thomina Andrea Joensen (Hvítanes) og Poula Susanne Olsen (Borðan).

Kunnu lesararnir hjálpa við at seta røttu nøvnini á røttu persónarnar, so vinarliga ringið til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

### Eigur nakar mynd av konfirmantum frá 1934?

Kann nakar hjálpa okkum við at finna myndina av konfirmantunum tann 8. apríl 1934?

Hesir vóru konfirmantarnir: Hannes Gotfred Dam, Sofus Johannes Carl Hansen, Johan Weihe, Arne Peter Nicolajsen, Joen Jacob Lassen Joachim Johannesen, Peter Ferdnand Petersen, Ejler Oluf Dam, Karl Johan Poulsen, Ásmund Mikkelsen, Arnfinnur Debes, Herluf Olsen, Rebekka Marie Mikkelsen, Anna Martine Trolle Mortensen, Retta Kay Kate Gjoveraa, Lilly Cathrine Rubveksen, øll úr Havn, Elieser Nielsen (Nólsoy), Hans Christoffer Poulsen (Hestur), Daniel Pauli Danielsen, Johanne Simona Danielsen (Nólsoy), Juline Marie Borghild Joensen (Hvítanes) og Thomine Sofie Johansen (Argir). Um nakar eigur ella veit um mynd av hesum konfirmantunum, vinarliga ringið til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

# Skóhornið í Bøgøtu

Mánadagin 14. november læt upp nýggi skógvahandilin Skóhornið í Bøgøtu 2 í Havn, har sum handilin Listir var áður.

Tað er 33 ára gamli Axel Mc Intosh, sum eigur og rekur handilin. Axel er annars útbúgvin datamatikari, men hann hevur í nøkur ár eisini selt arbeiðsklæðir í heilsølu.

Aksel sigur, at vøruúrvalið hjá Skóhorninum er skógvar til allar aldursbólkar, og hann leggur serligan dent á at vera bíligastur á marknaðinum við skóm í góðum kvaliteti.

Hesa vikuna hevur Skóhornið upplatingartilboð við 20 prosentum í avsláttri av øllum vørunum.



*Axel Mc Intosh, sum eigur og rekur Skóhornið, og Elly Andersen, sum eisini arbeiðir í handlinum*